DAGSINS MEINING

Óvissa og tilbúgving

Tr‡ av oljusamtøkunum, sum hava fingi› leitiloyvi á landgrunninum, eru eftir øllum at døma klár til at seta borin í. Tey hava í hvussu er gjørt av, nær og hvar tey skulu bora næsta ár. Statoil-bólkurin fer longu at bora í seinnu helvt av mai ella tí›liga í juni, sí›ani kemur túrurin til Amerada Hess bólkin og loksins til BP. Vi› ø›rum or›um ver›a tríggir ella helst f‡ra brunnar bora›ir á landgrunninum frá mei til oktober næsta ár.

Men er er tó eitt stórt men. Og naka› sum oljufeløgini eftir øllum at døma kenna seg ógvuliga ótrygg vi›. Ta› er ta› arbei›i, sum føroyskir myndugleikar skulu gera í sambandi vi› tilbúgvingin og umhvørvisgó›kenning, á›renn oljufeløg kunnu og vilja bora. Hetta s‡nis eftir øllum at døma vera naka›, sum ikki er komi› uppá pláss enn, og eftir eru bert nakrir fáir mána›ir, til borast skal.

So kann ein spyrja, hvør ta› er, sum hevur ábyrgdina av hesum øki. Ta› hevur veri› Vinnumálast‡ri›, men nú er ta› so Fiskimálast‡ri›. Aftrat hesum bá›um er so Oljumálast‡ri›, sum hevur havt ábyrgdina av stórum parti fyri ikki at siga øllum útviklinginum á oljuøkinum.

Herfyri úttala›i ein av stjórunum í einum av oljufeløgunum, sum skal bora næsta ár, at tí›in er vi› at ganga undan fyri at fáa eina veruliga tilbúgving uppá pláss. Hetta er naka›, sum oljufeløgini taka í største álvara, og her er eingin gó›a mamma, tilbúgvingin skal vera uppá pláss. Annars ver›ur eingin boring. Ein kann tí ímynda sær, at oljufeløgini í løtuni ganga vi› einum ótta um, at tilbúgvingin rætt og slætt ikki ver›ur klárt til næsta summar. Men her finst so eitt alternativ, og ta› er at lata breskum myndugleikum ábyrgdina av tilbúgvingini í hvussu er í byrjanini. Tvs. at so kemur alt at ganga úr Aberdeen. Men hetta er so ikki í trá› vi› andan í útbjó›ingarlógini, at sum mest skal fara um føroyskt øki. Men eitt er tilbúgvingin, eitt anna› er so umhvørvisgó›kenningin og ta› sum fylgir vi› henni.

Ta› vil vera einki minni enn ein skandala fyri føroyskar myndugleikar, um so er, at vit ikki megna at fáa tilbúgvingina uppá pláss, nú Oljumálast‡ri› jú hevur lati› loyvini til at bora næsta ár. Eru vit seinir á sjóvarfallinum, so má øll fer› setast á umrødda mál beinanvegin, og tey ymsu st‡rini mugu til at arbei›a betur saman. Men mest umrá›andi er at vita, hvør veruliga hevur ábyrgdina. Og ta› hevur helst Fiskimálast‡ri›. Hvat ta› so ætlar vi› donsku sjóverjuni vi› Føroyar og hvønn leiklut hon skal hava í eini føroyskari tilbúgving er eisini áhugavert at vita. Her má ein gera sær greitt, hvat er politikkur og hvat er veruleiki.

Sosialurin

NØVN Í VIKUNI

Tri›i túrurin á brúnni

Tá i› hann var ungur, hev›i hann neyvan hugsa› sær at ein stórur partur av hansara arbei›slívi skuldi vera sløttum gólvi.

Men kortini fer 58 ára gamli Jógvan Krosslá nú undir sítt tri›ja valskei› sum borgarstjóri í Vági.

Jógvan Krosslá hev›i annars ætla› sær eitt arbei›slív á havinum. Ungur fór hann á skiparaskúla, og aftaná ta› sigldi hann í nógv ár, eitt nú sum st‡rima›ur, bæ›i vi› fiskiskipi og úti í ver›ini.

Men í 1982 setti hann føtur á egi› dekk, so at siga, tá i› hann keypti útró›rarbátin Gásholm, sum hann rak í gó› 13 ár.

Í 1985 stó› honum í bo›i at blíva stjóri í timburhandlinum á Flø›uli› og hann tók av.

Hann var stjóri í sjey ár, til hann var› stilla›ur upp fyri tjó›veldisflokkin til b‡rá›svali› í Vági í 1992.

Hann var› valdur og bleiv harafturat valdur til b‡rá›sformann.

Hetta var ein sera trupul tí› at taka ró›ri› í Vágs Kommunu.Vágur var› sera hart rakt av kreppuni og fíggjarstø›an hjá kommununi hekk í riklingsbeiti.

Men ta› eydna›ist kortini b‡rá›num, smátt um smátt, at fáa Vág á føtur aftur.

Fyri hetta fekk Jógvan Krosslá so dygga áltisváttan frá veljarunum á valinum í 1996, at ta› slapst ikki uttanum hann, tá i› borgarstjóri skuldi veljast aftur. Og vali› í ár vísti, at vágbingar hava langt í frá mist áliti› á borgarstjóranum, tí á valinum seinasta t‡sdag, fekk hann meiri enn tvær fer›ir so nógvar atkvø›ur, sum tann næstvaldi b‡rá›slimurin.

Jógvan Krosslá hevur tvey frítí›arítriv framum naka› anna›. Ta› er føroyski dansurin og báturin hjá honum, sum eitur "Seks Systkin" – og ta› sigur okkum eisini, hvussu nógv børn hann eigur.

Men hann var oftari at síggja í føroyskum dansi fyrr, og hann var oftari í fjør›inum fyrr, enn hann er nú, tí borgarstjórastarvi› er so miki› krevjandi, at orka er líkasum ikki til naka› serligt, tær fríløtur, sum eru.

Minningaror› um Ingibjørg Poulsen

Torført er at skilja, at Ingibjørg ikki er okkara millum longur. Hon, i› altí› var lívlig og fyrikomandi, hvar hon so enn kom.

Fyri okkum í Havnar Ró›rarfelag hev›i Ingibjørg ein stóran leiklut í tí felagsarbei›i, i› vit dagliga hava. Hon baka›i bollar, gjørdi kakao og hugna›i um allar rógvarar, tá hon hev›i stundir til tess. Tá veitslur og hugnakvøld vóru, var Ingibjørg fastur fúsur í køkinum, og okkarar fatan var, at Ingibjørg tók sær altí› tí› til okkum í Havnar Ró›rarfelag. Ikki løgi›, at hon bert var nevnd Omman, tí hon var sum ein omma fyri økkum øll.

Altí› var hon klár vi› tvø›uni, tá tiltrongdi, mangan eru vit komin oman í neysti› og sæ›, at øll vindeygu vóru ví›opin, og tá vistu vit, at Ingibjørg var komin oman fyri at reingera eftir okkum.

Siglandi mann hev›i Ingibjørg, og var Joen Jacob alt og eitt hjá henni, tey vóru ein fyrimynd hjá okkum øllum, og tók hann sjálvandi eisini lut í tí arbei›i, i› Ingibjørg gjørdi fyri okkum í Havnar Ró›rarfelag.

Eisini var Ingibjørg vi› á flest øllum stevnum, og var hon ein gó›ur stu›ul hjá øllum okkara limum bæ›i tá ta› gekk væl og minni væl.

Ingibjørg vaks upp úti í Hornabø, og ta› gjørdi, at hugurin til kappró›ur var stórur, tí sum hon seg›i, so var teinurin oman í Álake4r ikki langur, og var hon ikki har ni›ri, so eygleiddi hon ró›urin úr vindeyganum kvøld eftir kvøld.

Hetta var so vi› til at hon longu sum 14 ára gomul sat vi› ró›ri› fyri fyrstu fer›, og var hetta sjálvsagt umbor› á Sílinum.

Ingibjøærg hev›i ofta sagt frá, tá tær ró›u út til Nólsoyar um kvøldarnar fyri at fáa mjólk undan kvøldmálinum, go tiltikin er hon fyri at stimbra.

Eisini var stuttligt at hoyra hana grei›a frá, hvussu fer›ast var til og frá summarstevnum tá í tí›ini, fyri vi› Smyrli, sí›ani í lastini á onkrum bili, men sum hon seg›i, ta› var ta› reina luksus tá, og eingin gramdi seg.

Eisini í nevndararbei›i tók Ingibjørg lut í, hon var nevndarlimur í Havnar Ró›rarfelag eitt skifti í 70 árinum, og heta gekk hon upp í vi› lív og sál. Fyri fáum árum sí›ani avgjørdu vit at útnevna ein hei›urslim í HR, og var ta› sjálvsagt, at Ingibjørg fekk henda hei›ur. Hon var sera takksom fyri at vit valdu hana til fyrsta hei›urslim í felagnum, og hon livdi upp til hei›urin til sín sí›sta dag.

Ingibjørg var eisini ein av stovnarinum í Ró›rargrunni Føroya, i› hevur til endamáls at stu›la tjó›arítrótti okkara. At hava mist ein so gó›an vin og stu›ul er torført, má Harrin styrkja teg, Joen Jacob og familjuna í hesi sorg.

Fri›ur veri vi› minnium um okkara elska›u Ingibjørg

Havnar Ró›rarfelag

Sosialurin

Sosialurin
Stovna›ur: 1927
Ábyrgdarbla›stjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Bla›stjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tí›indalei›ari:
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

Markna›ardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Dagbjørt S. Hansen dagbjort@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

Bla›fólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Ey›un Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turi› Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmi›stø›in

Avgrei›sla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Bla›i› ver›ur prenta› mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

L‡singar

Freistir:	Tekstl‡singar	Størri l‡singar	L‡singartorgi›	Heilsanir
T‡sdagsbla›i›	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsbla›i›	T‡s. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsbla›i›	Mik. kl. 10	T‡s. kl. 15	T‡s. kl. 12	T‡s. kl. 12
Fríggjadagsbla›i›	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsbla›i›	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri l‡singar, sum nógv arbei›i stendst av, mugu vera inni í gó›ari tí› og á›renn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbi›jast í gó›ari tí›.

Stødd:
Ein heil sí›a í Sosialinum er 254mm brei› og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmi› millum teigarnar er 4mm.

Dúgvan seinka›

Smyril fer aftur at sigla til Klaksvík, tí umvælingin av Dúgvuni ver›ur ikki li›ug til tí›ina

SAMFER‹SLA
Ey›un Klakstein

Smyril fer aftur at sigla millum Klaksvík og Havnina í komandi viku.

Orsøkin til ta› er, at umvælingin av Dúgvuni ver›ur ikki li›ug, tá Ane Læsø fer aftur til Danmarkar, og tí má Strandfer›slan aftur lata Smyril gera túrar til Klaksvíkar.

Ólag hevur veri› á siglingini um Lorvíksfjør›, sí›ani hol kom á Dúgvuna miskei›is í sí›sta mána›i. Sí›ani hava ymisk strandfer›sluskip røkt siglingina.

Siglir til mánadagin

Seinastu tvær vikurnar hevur danska ferjan Ane Læsø, sum Strandfer›slan hevur leiga› úr Danmark, røkt siglingina millum Klaksvík og Fuglafjør›, og hesa tí›ina hevur gamla Ternan samstundis siglt millum Klaksvík og Lorvík.

Ane Læsø er leiga› til 6. desember, tá hon aftur skal ver›a í Danmark, og tí kann hon ikki sigla longur enn til mánadagin.

– Ta› vóru onkrir trupulleikar at byrja vi›, men sum heild eru vit nøgdir vi› siglingina hjá Ane Læsø, sigur Reidar Nónfjall, stjóri á Strandfer›sluni

Ein danskur skipari og maskinmeistari hava siglt vi› Ane Læse, hesa tí›ina hon hevur veri› í Føroyum.

Ternan I heldur fram

Tá Ane Læsø gevst vi› siglingini mánadagin, er umvælingini av Dúgvuni ikki li›ug, og tí kemur Smyril upp í spæli› aftur.

Strandfer›slan roknar vi›, at Dúgvan kann fara aftur í sigling fríggjadagin í næstu viku, og til ta tí› fer Smyril at gera eykatúrar millum Klaksvík og Havnina.

Ternan I heldur fram vi› siglingini, til Dúgvan aftur fer í sigling.

Danska avloysaraferjan, Ane Læsø, siglir millum Klaksvík og Fuglafjør› til mánadagin, tá hon aftur fer til Danmarkar

Áhugi úr Grønlandi fyri túgvuhúsinum

Danska verjan umhugsar at brúka eitt av smáu húsunum hjá Kára Thomsen sum bí›ihøli vi › ein tyrlupall í Grønlandi

HÚS
Ey›un Klakstein

Í næstu viku kemur ein ma›ur úr Danmark at hyggja eftir smáu túgvuhúsunum, sum Kári Thomsen, arkitektur, hevur gjørt.

Orsøkin til hesa vitjan er, at danska verjan umhugsar at brúka eitt av húsunum til ein tyrlupall í Grønlandi. Tyrlupallurin er í Ivituut, og í løtuni stendur ein gamal skúrur vi› hendan tyrlupallin.

Vi› hvørt er bí›ití› vi› tyrlupallin, tí fólk koma antin ov tí›liga, ella tyrlan kemur ov seint, og tí er brúk fyri at sleppa undir tak at bí›a.

Áhugin stavar frá l‡sing Danska verjan umsitir tyrlupallin, og teir eru áhuga›ir í at keypa eitt av húsunum, sum fólk helst kenna frá lendinum oman fyri Kvívík, har nøkur teirra standa.

Húsini eru 25 fermetrar, og eru ætla› sum summarhús, frítí›arhús ella minni familjuhús, men tey kunnu eisini brúkast til onnur endamál.

Marinustø›in í Havn hevur fingi› fyrispurningin úr Grønlandi, og har ver›ur sagt, at áhugin er komin, eftir at onkur hevur sæ› l‡sing fyri húsunum í grønlendskum bla›i.

Kanska er ein orsøk til áhugan, at sni›i› á húsunum minnir nógv um eina iglo – kavahúsini, sum eskimoar gera úr ísblokkum.

Kanska endar eitt slíkt hús sum bí›ihøl vi› ein tyrlupall í Grønlandi

Sjófrágrei›ing í næstu viku

Strandfer›slan vil hava sta›fest, hvat hendi, tá hol kom á Dúgvuna

ÓHAPP
Ey›un Klakstein

Fríggjadagin í næstu viku ver›ur sjófrágrei›ing um hendingina, tá hol kom á Dúgvuna í Lorvík 13. november.

Ta› er Strandfaraskip Landsins, sum vilja hava sjófrágrei›ing fyri at sta›festa, hvat ta› var, sum hendi hendan dagin.

– Vit halda, at ta› er rættast og ruddiligast at hava sjófrágrei›ing um hetta máli›. Hetta er eitt álvarsmál, og tí mugu vit fáa at vita, hvat ta› var sum hendi, sigur Reidar Nónfjall, stjóri á Strandfer›sluni.

– Tá vit hava fingi› sta›fest, hvat fór fram, kunnu vit taka ein avger›, um naka› ví›ari skal henda í málinum, sigur hann.

Sjófrágrei›ingin ver›ur í Føroya Rætti komandi fríggjadag, og Strandfer›slan SL hava skoti› upp at innkalla skiparan á Dúgvuni og lei›aran á Havnadeildini hjá Landsverkfrø›inginum til at geva frágrei›ing. Um ney›ugt ver›a eisini a›rir relevantir persónar innkalla›ir at geva frágrei›ing.

Telduspøl
Top 10
1. Championship Manager 00/01
2. Red Alert 2
3. Fifa 2001
4. Delta Force Land Warrior
5. Sudden Strike
6. Tomb Raider Chronicles
7. Swat 3
8. Master of Olympus: Zeus
9. Baldurs Gate 2
10. The Sims - Living it up

nr. 1

SpF Teldu Tænastan
Staravegur 5 - Telefon 317620 - Heimasíða www.tt.fo